# <u>Tjaldrið tekur franskan trolara á Munkagrunninum</u>

## Franski trolarin, Cote Seint Jacques, sum varð tikin fyri ólógliga trolveiðu á Munkagrunninum, var júst komin undir Føroyar at royna, tá ið hann var tikin av Tjaldrinum.

Fríggjadagin 9. mai 1980 fór kanningarlið av Tjaldrinum, undir leiðslu av yvirstýrimanninum Rúna Henze, umborð á franska trolaran Cote Seint Jaques at kanna veiðu og reiðskap. Kanningarliðið kom eftir, at veiðan var í lagi, men at trolposin var snørdur við trimum tvørbondum. Tað fyrsta tvørbandið frá botninum av var 1,55 m, tað næsta var 1,65 m, og tað ovasta var 1,35 m. Kanningarleiðarin Hentze legði hetta fyri skiparan á Tjaldrinum, Eyðbjørn Lervig, at taka støðu til. Lervig skipari tók avgerð um at handtaka Cote Seint Jacques og føra hann til Havnar. Hann gav nú kanningarleiðaranum boð um at leggja tað fyri skiparan á Cote Seint Jacques, Paul Bellamy. Skiparin játtaði beinanvegin at fylgja við til Havnar, og klokkan 14.00 varð ferð sett á ímóti Havnini, har bæði skipini komu klokkan 19.30 sama kvøld.

## Rættarfundurin.

Leygarmorgunin 10. mai klokkan 10.00 varð rættarfundur settur í dómhúsinum í Havn.
Skiparin á Cote Seint Jacques, Paul Bellamy viðgekk beinanvegin, at hann hevði trolað á Munkagrunninum við trolposa, ið var snørdur við trimum tvørbondum.Tað fyrsta av bondumum var sum áður nevnt 1,55 m, tað næsta var 1,65 m, og tað ovasta var 1,35 m.
Paul Bellamy segði, at hann visti ikki betur, enn at loyvt var at trola við snørdum trolposa undir Føroyum, tí at kanningarlið av vaktarskipinum Ólavi Halga í oktober 1979 var umborð á Cota Seint Jacques og kannaði trolreiðskapin, sum tá eisini var snørdur, og sum eftir øllum at døma skuldi vera í lagi ta ferðina, og legði hann aftrat, at hann eisini var skipari tann túrin.
Nú var so 1. stýrimaður á Ólavi Halga, Dávur Emil Magnussen førdur sum vitni. Hann segði, at tað var hann, sum stóð fyri kanningini, sum fór fram tann 16. oktobur 1979 á Munkagrunninum.
Víðari segði Dávur Emil, at hann hevði ikki sæð, at nakað var galið við trolposanum, í hvussu so er vóru ongar snøringar, men bert stroppar, sum vanliga plaga at vera um trolposan, sum svaraðu til víddina á trolinum.
Nú kom nakað av dramatikki upp í málið við tað, at Bellamy skipari segði, at hann ikki kendi mannin aftur, sum hevði verið umborð á Cote Seint Jacques. Hann stóð fast við, at tað var ikki sami maður, sum nú var í rættinum, sum hevði verði umborð

ta ferðina í oktober 79, tá ið trolreiðskapurin varð kannaður. Til hetta segði Dávur Emil, at hann ta ferðina var øðrvísi ílatin, hann var undir kasketti og var í oljuklæðum. Eisini segði hann seg at kenna bæði skiparan og fjarritaran, sum eisini var í rættinum, aftur.
Upplýst varð, at frágreiðing varð skrivað um hetta, at eingin skeivleiki var við trolinum, og at tað í allar mátar var lógligt. Dávur Emil segði, at tað var fjarritarin, sum undirskrivaði hesa rapportina.
Nú vendi Dávur Emil sær beinleiðis til Bellamy skipara og spurdi hann, um hann ikki kundi minnast at hann, Bellamy, hevði spurt, um hann ikki kundi fáa eitt streymkort yvir Føroyar, og at bátur frá Ólavi Halga var komin við einum korti, sum hann var ógvuliga takksamur fyri.
Paul Bellamy segði síðani, at tað kundi vera, at hann ikki kendi mannin aftur av tí, at hann var øðrvísi ílatin ta ferðina, hann var umborð á Cote Seint Jacques. Men tá ið hann nevndi um streymkortið, kundi hann væl minnast, at hann hevði fingið eitt streymkort frá einum kanningarholdi, sum hevði verið umborð hjá teimum, og, legði hann afturat, at hann hevði havt stóra nyttu av kortinum. Bellamy skipari vendi sær nú móti Dáva Emil og segði, at um tað var hann, sum hevði givið sær kortið, vildi hann enn eina ferð takka fyri tað. Víðari segði Bellamy, at hann stóð fast við, at tvær snøringar vóru um trolið ta ferðina, kanningarlið av Ólavi Halga hevði verið umborð, men at tær vóru leysar, og at kanningarliðið neyvan hevði varnast snøringarnar av tí, at trolið var skrætt og var undir umvæling, og at nógv stríð stóðst av hesum.
Klokkan 4 seinnapartin fall dómur í málinum, sum ljóðaði uppá 30.000 kr í bót, umframt at hald var lagt á veiðu og reiðskap. Cote Seint Jacques var komin undir Føroyar at royna dagin fyri, at hann var tikin av Tjaldrinum.

**Cote Seint Jacques ger ein góðan túr.**

Paul Bellamy gjørdi skjótt av. Longu klokkan 6, tveir tímar eftir at dómurin var fallin og fiskurin var landaður á Bacalao, var Cote Seint Jacques á veg út um molan við kós móti Munkagrunninum. Veiðan vág 3.376 kg.
Longu mánakvøldið boðaði Cote Seint Jacques Vaktar og Bjargingartænastuni frá, at hann fór at sigla heim. Hann hevði ongan lógligan trolposa eftir at royna við.
Tað hevði gingist stak væl hjá Cote Seint Jacques frá tí, at hann kom aftur á fiskileið seint leygarkvøldið, til hann gavst mánakvøldið. Hann hevði 31 tons inni, tá ið hann fór at sigla heim, 18 tons av kongafiski, 12 tons av upsa og 1 tons av øðrum. Hann hevði roynt 40 fjórðingar í ein beinan eystan úr Akrabergi.

**Mortan Johannesen, hjá Andriasi, sigur frá.**

Mortan var skipari á Suðringi frá 77 til og við 85. Árini frammanundan hevði hann ført Polarborg 1, og við Polarborgini varð ikki fiskað nógv undir Føroyum, kanska

ein triðing av tíðini. Annars var tað mest undir Íslandi. Hetta broyttist, tá ið Suðringur kom og hevði nóg sterk spøl til at royna á djúpum vatni undir Føroyum. Mortan sigur, at hann var ikki kendur á bankunum vestanfyri, so sum Føroya Banka, Bill Bailleys, Lúsabankanum og Hatton Bank. Ein túrin, teir royndi har vesturi, vóru fleiri franskir trolarar har á leiðini. Hann kom tá í samband við Cote Seint Jacques, har Paul Bellamy var skipari. Tað vísti seg beinanvegin, at Bellamy var ein maður, sum var ógvuliga lagaligur at hava við at gera. Hann var altíð fúsur at koma við upplýsingum um fiskarí og onnur viðurskifti í hesum sambandi. Bróður Mortans, Sonny, førdi Rankan um sama mundið. Hann sigur tað sama um Bellamy og fransmenn sum heild. Eina ferð Mortan var í Týsklandi við Suðringi og landaði, lá ein franskur trolari har, Notre Dame Salute, og hann hevði fingið nógva blálongu á Hatton banka. Mortan gjørdi av at fara umborð at hitta skiparan. Komin umborð var hann beinanvegin boðin inn á skiparakamarið. Skiparin á Notre Dame Salute var ógvuliga fyrikomandi maður. Hann kom fram við einum korti og greiddi Mortani frá um leiðirnar vestanfyri, Føroya Banka, Bill Bailleys, Lúsabankan og Hatton Bank. Avrátt var, at teir skuldu hava samband sínámillum, tá ið teir vóru saman á fiskifeltinum, og eftir hetta hevði Mortan nógv samskifti við Notre Dame Salute.
Mortan møtti ongantíð Paul Bellamy persónliga, men bæði hann og bróðurin Sonny høvdu nógv samskifti við Bellamy, og hava báðir alt gott at siga um hann.

Heimildir
Dimmalætting
Skipsdagbøkur av Tjaldrinum
Mortan Johannesen Skipari Tórshavn